## Størri stættarmunur í Svøríki

Tey væl bjargaðu í Svøríki hava jól og góðar dagar. Tað sæst í einari kanning, sum fakligi landsfelagsskapurin hevur gjørt, og sum vísir, at tey ríkastu 10 prosentini av svenska fólkinum øktu sína tøku inntøku heili 88 prosent í árunum frá 1991 til 2007. Hjá teimum fátækastu 10 prosentunum var vøksturin bara 15 prosent í sama tíðarskeiði. Kanningin hjá svenska LO vísir eisini, at tey seinastu seks árini hava arbeiðandi sviar havt ein reallønarvøkstur upp á 3,3 prosent um árið, meðan vøksturin hjá sjúkum, arbeiðsleysum og fyritíðarpensjonistum hevur verið 0,86 prosent um árið.



## Íslendingar liva leingi

Tey børn, sum vórðu borin í heim í Íslandi í 2007, kunnu rokna við at liva 81,2 ár í meðal. Tað siga tøl hjá OECD, sum eisini vísa, at íslendingar liva í meðal tvey ár longri enn meðallivialdurin í OECD-londunum. Sambært tølunum liva íslendskir menn 79,4 ár og íslendskar kvinnur 82,9 ár. Bara menninir í Sveis liva longri enn teir íslendsku. Íslendsku kvinnurnar hava at kalla sama livialdur sum kvinnurnar í Noregi og Eysturríki, men tær kunnu tó ikki kappast við kvinnurnar í Japan, sum liva 86 ár í meðal.

# Flakavirki á Tvøroyri takast niður




*Tvøroyrar Býráð kann ikki góðtaka, at Fiskavirking leggur hald á besta, vinnuliga grundstykki í kommununi uttan at brúka tað til nakað sum helst, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri*

**Fer Fiskavirking ikki heilt skjótt undir aftur virksemi á flakavirkinum á Tvøroyri, kann tað skjótt enda við, at virkið skal takast niður og flytast burtur, sigur borgarstjórin á Tvøroyri**

FISKAVIRKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Virksemið á flakavirkinum hjá Fiskavirking á Tvøroyri, skal takast upp aftur heil skjótt.

Hendir tað ikki, verður Fiskavirking helst tvingað til at taka virkið niður og flyta tað burtur, so at onnur fáa atgongd til grundstykkið, sum virkið stendur á.

Tað staðfestir Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Tekur Fiskavirking ikki arbeiðið á flakavirkinum á Tvøroyri uppaftur heilt skjótt, fer Tvøroyrar býráð at uppsiga leigusáttmálan um grundstykkið, sum virkið stendur á.

Sáttmálin um grundstykkið, sum flakavirkið stendur á, sigur, at hevur onki virksemi av flaki ella ísi verið á virkinum í tvey ár, kann sáttmálin sigast upp við eini freist upp á eitt ár.

Tað er langt síðani, at tey hildu upp at at arbeiða fisk á virkinum, men nakað eftir tað, gjørdu tey framvegis ís til bátar og skip.

Men eisini tað er langt síðani hildið uppat og borgarstjórin sigur, at seinastu ferð, at virkið lat ís, var 27. mars í 2008

- Tað hevur verið ógvuliga óheppið fyri bátarnar, sum hava avreitt til landingarmiðstøðina, tí eftir at teir hava avreitt, mugu teir antin til Vágs ella aðrastaðni eftir ísi og tað er ógvuliga tvørligt hjá teimum.

### Siga sáttmálan upp

Um góðar tríggjar mánaðir er tað sostatt tvey ár síðani, at nakað sum helst virksemi var á virkinum og tá fer býráðið beinanvegin at viðgera spurningin um at uppsiga sáttmálan, so at tey kunnu vera fullkomliga leys av honum á vári í 2011.

Tíverri er sáttmálin so bundisligur fyri kommununa, at tað ber ikki til at sleppa burtur úr honum skjótari enn tað.

- At siga sáttmálan upp er tað einasta, býráðið kann gera. Og so má Fiskavirking taka virkið niður og flyta tað av økinum, leggur Kristin Michelsen afturat.

Fiskavirking leigaði eisini onnur høli á havnarlagnum á Tvøroyri, men tann sáttmálin var lættari hjá býráðnum at sleppa burtur úr og hann er eisini langt síðani uppsagdur.

Annars hevur Tvøroyrar Býráð biðið um fund við leiðsluna í Fiskavirking at vita, hvørjar ætlanir, felagið hevur við virkinum á Tvøroyri.

Men Kristin Michelsen væntar ikki at nakað kemur burtur úr, tí tað er onki, sum bendir á, at ætlanin er at lata virkið upp aftur.

- Tvørtur ímóti er fleiri og fleiri av maskinunum tiknar niður, eins og virkið ikki verður hildið og fellur í órøkt.

- Og Tvøroyrar Býráð kann ikki góðtaka, at Fiskavirking leggur hald á eitt so stórt øki fremst á havnarlagnum, uttan at brúka tað til arbeiðsskapandi endamál.

# Skulu hava skrivligt loyvi fyri at eiga fuglabyrsu

**Nú skulu allir føroyingar, sum eiga ella keypa eina fuglabyrsu, hava skrivligt vápnaloyvi frá landsstýrinum**

VÁPNALOYVI
*Áki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hereftir skulu allir føroyingar hava vápnaloyvi fyri at keypa sær eina høglbyrsu.

Tað ætlar Sjálvstýrisflokkurin.

Flokkurin hevur nú lagt uppskot fyri Løgtingið um at herða vápnalógina, ella nútímansgera hana, sum flokkurin nevnir tað.

Men áðrenn vápnaloyvi verður játtað, skal umsøkjarin taka dugnaskapsroynd í vápnabrúki, har hann fær undirvísing í vanligum vápnabrúki.

Áðrenn loyvi verður játtað, skulu myndugleikarnir eisini kanna viðurskiftini hjá umsøkjarunum og vísa tær kanningar, at vandi er fyri, at umsøkjarin fer at brúka byrsuna á óhóskandi hátt, skal tað bera til at nokta at játta loyvið.

Hesi fyrstu 10 árini skal vápnaloyvi vera eitt tilboð, men frá á ólavsøku 2020, skal tað vera eitt krav, heldur Sjálvstýrisflokkurin.

Flokkurin ætlar eisini, at á almennum støðum skal tað hereftir verða ólógligt at hava knív ella annað hvat vápn uppi á sær.

Men er talan um fletting, fiskiveiði, grindadráp ella annað rímiligt endamál, skal tað vera loyvt at hava knív við sær, sum annars er forboðin og bannið er heldur ikki vent ímóti vanligum felliknívum.

Samstundis skal tað verða forboðið at hava nakað at gera við hvøss vápn, knívar, svørð, korur verjuvápn, gassvápn, slagvápn, kastivápn ella líknandi vápn ella útgerð.

Harafturat skulu tey, sum selja skotvápn, hava loyvi til tað frá landsstýrinum.